Fekk etingarólag 14 ára gomul:

# Ein áheitan um at klænka fe

## Eftir at hava havt sjúkuna anorexia nervosa í fleiri ár, tók tað 42 ára gomlu Janu fleiri ár at koma fyri seg aftur. Í dag livir hon sum fólk flest, hevur familju og arbeiðir við at geva fólk ráð og leiðbeing um likamsvenjingar og góðar kost- vanar

*Dagny Joensen*

- Eg vil heldur vera sunn og frísk enn eitt beinut, últsaligt riturræ.

Tað sigur 42 ára gamla Jana Eidesgaard Thomsen, sum um 14 ára aldur fekk álvarsligt etingarólag. Frá at vera ein heldur trivaligur tannáringur seinast í sjeytiárunum, fór hon undir at klænka seg og gavst at enda við at eta og varð innløgd.

Í dag er Jana E. Thomsen, útbúgvin økonoma og likamsvenjari. Hon er stjóri í Fragd& Fimi, og kann í sínum arbeiði nýta sína vitan um heilsugóðan kost og likamsvenjingar at hjálpa fólki, sum hava brúk fyri at broyta livihátt.

Jana og maðurin Kenneth Samuelsen og dóttirin Joan, sum er 17 ára gomul, búgva í hugnaliga heimi teirra á Argjum.

**Læknin skelkaði hana**

Um sína tíð við sjúkuni anorexia nervosa, sigur Jana:

- Tað byrjaði við at eg noktaði at eta, tá eg var 14 - 15 ára gomul. Eg kann bert koma á eina hending, sum var orsøk til tað.





*Í royndini at fóta sær eftir drúgva etingarólag - sjúku, nýtir Jana E. Thomsen í sínum arbeiði ein part av tíðini til at geva fólki undirvísing um heilsugóðan kost og likamsvenjingar. Á myndini (innsett) sæst 17 ára gamla Jana, áðrenn hon hevði fingið tamarhald á sjúkuni*